# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Olentina Simonsen,** fødd Jacobsen, úr Klaksvík, andaðist týsdagin 79 ára gomul.

**Erling Splidt** úr Nes-Vági fer til gravar úr Vágs kirkju fríggjadagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Erling, kunnu lata Føroya felag móti Krabbameini eina pengingagávu. Konta í pengingastovni.

Jarðarferðin hjá **Guðrið Paulinu Johannesen** verður úr kirkjuni í Bryndum, 6715 Esbjerg N fríggjadagin klokkan 13.

†

Kunngjørt verður, at kæri sonur mín, bróðir, svágur og gubbi okkara

**Jørgin Johansen**
Runavík

andaðist leygardagin 10. november,
44 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju
fríggjadagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Sanny**
**Marjun, Oddbjørg, Ingun og Kristian**

Tey, ið vilja minnast Jørgin, kunnu lata eina peningagávu til frama fyri ungdómsarbeiði hjá NSÍ, konta í Norðoya Sparikassa.

## Dagurin

**16. november. Otenius.** Skrivað skeivt fyri hin halga Otmarus, sum var abbati í kleystrinum St. Gallen í Sveis og doyði í 759.




# Kirsten Brix 60

Í dag, hósdagin tann 15. nov., verður Kirsten Brix seksti. Kirsten er fødd í Give og vaksin upp í Grindsted og Give í Jyllandi. Eftir lokið studentsprógv las hon mál á Lærda Háskúlanum í Århus og tók prógv sum cand. mag. við týskum sum høvuðsgrein og donskum sum hjágrein. Hon varð sett í fast starv á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í 1975. Hon hevur virkað á hesum skúla síðani og hevur sostatt í ár 32 ár á baki sum lektari har.



Kirsten fekk tíðliga áhuga fyri føroyskum máli og bókmentum og fór í áttatiárunum í farnu øld undir at útbúgva seg í føroyskum. Hon tók prógv í føroyskum máli og bókmentum og legði sostatt eina lærugrein aftrat virkinum sum lektari í týskum og donskum. Hon fór í 1999 undir at lesa føroyskt á universitetsstigi og vardi trý ár seinni, í 2002, á Fróðskaparsetri Føroya Ph. D.-ritgerðina *Dialog i Babelstårnet* um prosaskaldskapin hjá Regini í Líð.

Umframt at undirvísa á Studentaskúlanum, og í tíðarskeiðum á Føroya Læraraskúla og á Fróðskaparsetri Føroya, hevur Kirsten almannakunngjørt greinir og ritgerðir um serliga føroyskar bókmentir. Hesir tekstir eru at finna í m.a. *Varðanum*, *Fróðskaparriti* og *Frøði*, umframt í útlendskum ritum. Hon hevur lagt til rættis bókina *Glámlýsi*, 2003, við søgum eftir Regin í Líð og (saman við Heðini M. Klein og Bergljót av Skarði) *Frostrósuna*, 1987 og (saman við Svannu Hanusardóttur) stuttsøgusavnið *Slóðir*, 1992, sum seinni er uppafturprentað í fleiri nýggjum útgávum.

Kirsten hevur umsett føroyskar bókmentir til danskt og týskar og svenskar klassikarar til føroyskt. Nevnd kunnu vera verk sum *Dómarin og bøðil hansara,* 1992, eftir Friedrich Dürrenmatt, *Glas lækni*, 1994, eftir Hjalmar Söderberg, *Pilgrimme*, 2003, eftir Hanus Kamban og *Blid er den færøske sommernat,* 1991, tann fyrsta krimiskaldsøgan eftir Jógvan Isaksen. Hennara størsta týðingarverk var bókin *J.H.O. Djurhuus – en litterær biografi,* sum kom út á Odense (Syddansk) Universitetsforlag í 2001. Henda týðing fekk sera góða umrøðu í Danmark. Kirsten hevur eisini týtt og lagt til rættis antologiina *En vandhistorie og andre færøske fortællinger,* sum kom út hjá forlagnum Vindrose í 1994.

Kirsten var limur í javnstøðunevndini 1994-2002 og í Mentanargrunni Landsins 2002-2004. Hon er gift við rithøvundinum Hanusi Kamban. Tey hava tveir synir.

Kirsten er burturstødd á føðinga rdegnum.

# Jógvan Hansen 100 ár

Fríggjadagin 16. november fyllir ein kendur klakksvíkingur 100 ár. Kanska tey eldru og miðaldrandi vita hvør hann er, men tað knípur hjá teimum yngru.

Talan er um Jógvan Hansen, vanliga nevndur Jógvan hjá Berlinu, er sonur Símun Júst Hansen (úr Mikladali) og Berlinu Samuelsen á Stongunum í Klakksvík. Hagar tey giftust inn hjá Kollfjarðamariu (úr Elduvík), sum var einkja eftir Jógvan Samuelsen (úr Kollafirði) sum sjólætst í 1884.

Tey vóru 10 systkin, har Jógvan er tann triði í røðini. Á lívi eru í dag Turið á Grømma (91 ár), Martin og Daniella (90 ár).

Jógvan giftist í 1947 við Hannu úr Ánunum, og búsettist tey á Kósini. Tey fingu 3 børn, Jórun, Halgerð og Símun Sofus Berg. Konuna misti hann í 1997 og yngru dóttrina í bestu árum í 2003. Tað setir síni spor.

Longu í 1922, fimtan ára gamal, fór hann til skips við "Guðrun", sum Guttormur í Árnafirði førdi. Hann var heili seks ár við deyðsiglara, seinast við "Solo" og "Pride", sum Jens Chr. í Toft førdi.

Fram til fyrra heimsbardaga við ymiskum skipum



m.a "Viðoy" og "Stellu Mariu" Tað var hart lív at søkja Suðurlandi við Íslands strendur og onnur ár ofta við Grønland.

Hann at rógva út, men sildi ikki undir krígnum. Tað mesta av tíðini við "Norðan", og annað fyrifallandi lossingarbeiði til hann gavst fyri aldur. Var tað vandafult at sigla til Ísland og Bretland, eftir og við fiski, so var tað ikki minni vandafult at rógva út tey árini, hóast teir sluppu ótrúliga væl.

Í dag er hann einsamallur í húsi, fyri tað mesta, men hann fær hjálp ígjøgnum dagin. Hann klárar seg heilt væl einsamallur, fylgir við útvarpi og sjónvarpi allan dagin út á kvøldi. Jógvan púra ándsfrískur og minnist óvanliga væl, heilt í smálutir frá barnaárum av. Tó fær hann sær ein lúr hvønn dag, aftaná døgurða.

Eyguni eru ikki so góð nú, men hoyrnini er einki at siga við, og gongdin er so nøkulunda og eisini trappurnar.

Eg vil við hesum fáu orðum ynskja tygum hjartaliga tillukku við stóra degnum og Guðs signing í døgunum sum koma og fleiri góð ár afturat.

Heilsan

**Skyldmaður HWH**